## DAGSINS MEINING

# Ein nýggj roynd

Tað eru ser ymisk tíðini, sum seinasta árið hava gingið um lagnuna hjá Smyril Line og hjá Norrønu. Norrøna kom á sinni sum eitt landsfevnandi ódnartak. Fólk í stroum tali settu pening í fyritøkuna Smyril line tikl tess at tryggja, at uttanlandasiglingin ikki datt niðyr fyri bakk. Henda sigling var byrjað og arbeidd upp av staranferðsluni, ið silgdi til bretlands, Noregs og til Íslands. Men so varð henda farleið privatiserað og nýggja felagið við nógv partaeigarum varð stovnað. Gamla Norrøna var ikki hóskandi skip. Hon var eitt gott føroyskt arbeiðspláss, men mátti skiftast út vegna herd altjóða krøv. So varð nýggja Norrøna bíløgd, eitt sera stásiligt skip, men kanska var ov nógv lagt fyri. Nógvar fortreytir eru broyttar og trupulleikar hava ikki trotið. Roynt hevur verið leingi at loysa teir fíggjarligu trupulleikarnar og eina tíð tóktist, sum Norrøna fór at gleppa føroyignum av hondum. Men nú tyksit ein áhugaverd vend at vera komin í malið.

Framtaksgrunnurin er størsti partaeigarin í Smyril Line. Tað er greitt, eftir at íslendskia Austfar, føroyski Framtakgrunnurin og Tryggingarfelagið Føroyar hava játtað at seta tilsamans 60 milliónir krónur í nýggjum partapeningin í Smyril Line. Samstundis boðar nevndin í Smyril Line, frá, at ætlaða avtalan við Fjord Line um at stovna ferjufelagið North Atlantic Line verður av ongum. Tó fara feløgini framhaldandi at samstarva á ymsum økjum, sum hava við vinnuna at gera, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line. Í staðin er Smyril Line í samráðingum við stóra flutningsfelagið Blue Water, sum arbeiðir rættiliga víða um í Europa, um at stovna eitt felags farmafelag. Tann avtalan við at koma undir land og verður væntandi klár tann fyrsta apríl, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line.

Smyril Line fer at hava Norrönum sum siglandi partin av flutningskervinum hjá nýggja felagnum. Blue Water hevur rættiliga væl útbygt flutningskervi á landi. Feløgini fara at eiga hvør sína helvt av partapeninginum í nýggja flutningsfelagnum. Við nýggju avtaluni um partapening tykist avgerðarætturin enn tryggari heima aftur í Føroyum. Framtaksgrunnurin, sum nú er størsti einstaki partaeigarin, eigur nú saman við Tryggingarfelagnum Føroyar og íslendska Austfar 62 prosent av samlaða partapeninginum í felagnum. Hetlendski menningargrunnurin, sum undan hesi avtaluni var størsti einstaki partaeigarin við góðum 30 prosentum av partapeninginum, eigur nú 20 prosent av partapeninginum. Hini 18 prosentini eiga aðrir smærri partaeigarar. Nú verður spennandi at vita, hvussu leikur fer. Tað er einki at ivast í, at flestallir føroyingar ynskja at varðveita Norrønu undir føroyskum flaggi, so tað er bert at vóna, at henda seinasat royndin fer at eydnast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tú bert okkum boð um ein ljósari dag



**Malmberg D. Olsen.**

So fór grækarismessa aftur um bak. Hon varð hildin í stormi og kavaroki runt um í landinum, men hóast kulda og kava er tað vælkenda klippið aftur at hoyra yvir oyggjar okkara. Tað ber okkum boð um ein ljósari dag, har myrkrið má dvína fyri ljósinum. Í skrivandi løtu tykist, sum veturin stríðist ímóti vársins lívgevandi megi, sum kallar allan vøkstur fram, og sum hevur ligið í dvala undir vetrarins køldu mold. Hesin kampur ímillum kulda og varma kann gott vara aprílmánað út.

At veturin hevur kenst baldrutur, kann man nokk siga. Eg hugsi, at mong av teim eldru hava kent veturin tungan og langan, nú vit fara um grækarismessu við kavaroks ódn.

Men tað er ein givin natúrlóg, at eftir vetur kemur vár, - tað liggur nakað gott fyri framman, tí tað fer umsíðir at næla og spretta úr døkku mold.

Vit hoyra javnan um at pensiónistarnir koma saman at hugna sær við ymiskum tiltøkum ígjøgnum árið. Hetta má sigast at vera sera gott fyri tað aldrandi ættarliðið, at kunna stytta sær um stundir við samveru. Og nú gamla Dimma er blivin so handig og løtt, ger tað ikki verri fyri tey gomlu, at tyggja uppá hana eina kvøldarstund, tá kalt og kavi er uttandura. Tað er bara eitt paradoks, - man má blaða fram aftur á forsíðuna fyri, at sikra seg um tað er gamla Dimma ein hevur í hondini, nú hon er so lík hinum bløðunum.

Páskirnar eru í hondum, sum er ein av teim stóru hátíðunum, sum kemur eins og tjaldrið ár um ár við einum uppreisnarboðskapi yvir oyggjarnar. Har vit verða mint um ljósið og myrkrið, sum bardust um maktina, lygnina og hatrið, og øvundina, sum gjørdi sjálvan Pilatus í villareiði í sínum dómarasetri í Antonia borgini. Framman fyri honum stóð maðurin, sum hann onga orsøk fann til at dómfella. Orðafelli frá Heródus til Pilatus er ikki komið av ongum.

Hetta var ein avgerandi løta í lívi Pilatusar. Hjá Jóhs. 18 lesa vit um samtaluna millum Jesus og Pilatus. Pilatus er gripin av Jesu orðum um, at ríkið hansara er ikki av hesum heimi, eitt so heilt annarleiðis ríkið har ein ikki vinnur sær terreng við svørði, men við kærleikans og sannleikans megi. Tað hevði Jesus sjálvur prógvað ta tíð hann var ímillum sítt fólk. Pilatus var týðuliga ávirkaður av sjálvum sannleikans harra, sum hann stóð andlit til andlit við.

Hurðin fór upp í Antoniaborgini, Pilatus trein út fyri jødarnar: Eg finni onga orsøk at døma henda mann. Tað var jú av berari øvundsjúku og hatri at hann var førdur til Pilatus.

Tað vóru eisini bert nakrir fáir dagar síðan tað rungaði eitt Hosianna róp í Jerusalemsgøtum, - vælsignaður verði hann, sum kemur í Harrans navni. Bara Jesus visti, at aftanfyri hesi róp bíðaði krossur og grøv.

Valið ímillum sannleikan og lygnina. Fyri at gera fólkinum til vildar vildi hann lata Jesus fáa sløgini, tí so mundi fólkamongdin fáa medlidenheit við Jesusi. Síðan vildi hann lata hann leysan.

Luk.23-16.

Niðri í tí myrka fangarúminum sat ein manndrápari av ringasta slag. Har burdi hann verðið sitandi, men fólkamongdin slapp at avgera lagnu hansara henda dagin. Valið kom at verða ímillum Barrabas og Jesus. Ivaleyst hevur Pilatus roknað við, at nú fór hann at sleppa burturúr hesum drama'inum, men so var ikki, tí nú blivu myrkursins kreftir sleptar leysar við valinum av Barrabassi og tað rungaði eitt Krossfest, Krossfest í fólkamongdini, gev okkum Barrabas leysan. Sannleikin bleiv krossfestur á Golgata. Tað var myrkursins tími.

Tað stóðu mong við Golgata kross henda dagin, summi nær, onnur longri frá. Mundi Barrabass vera ein av teimun, sum eygleiddu mannin frá Nasaret, sum doyr í mítt stað.

Pilatus vaskaði sínar hendur, tá hann hevði ofra sannleikan og tað sigst, at hann endaði sínar dagar, sum ein sinnissvakur maður, har hann sat og vaskaði sær um hendurnar í teim Fronsku Alpunum.

Àsannað bleiv av teim rómverksu herhøvdingum, at sanniliga var hann Guðs sonur, tá hann gav upp andan og rópti tað var fullgjørt. Natúran prógvaði eisini við sínum myrkri, sum legðist yvir staðið Golgata hesa løtu. Sanniliga var hann Guðs sonur. Matt.27-45-53.

Myrkt ella ikki, men tað er ein ævigur sannleiki.

Men hann var særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann,og av sárum hans fyngu vit heilsubót. Jesaja. 53.v 5.

Valgi er líka viðkomandi í dag Hvat velur tú?

Gleðilig Páskir í Jesu navn.

# Suðuroy og oddagrein í Dimmu 16. mars 2005



**Finnleif Guttesen**

Oddagreinin vísur enn einaferð hvussu lítlan ómak fjølmiðlar gera sær, fyri at finna út av, hví støðan er sum hon er og hvat vanligi suðuroyingurin heldur, um støðuna og teir býð-og bygdaráðslimir, ið hava avgerðarrættin.

Í oddagreinini eru tað fleiri ósvaraðir spurningar, hví verða hesir spurningar ikki settir til kommunustýrislimir.

Spyr tey nývaldu, um tey ikki hava eina sjálvstøðuga meining ella um tey eru stýrd av gomlum og afturhaldssinnaðum kommunustýrislimum, ið ikki tora at broyta meining.

Spyr tey nývaldu, um tey veruliga stuðla hesum lokalpolitikarum, ið eru so oyðileggjandi fyri Suðuroynna og sum eru so óttafullir fyri at missa stuðul frá einum lítlum bólki, ið bert hugsar um eitt, seg sjálvan.

Ella vilja fjølmiðlar bert hava yvirskriftir, og sum oftast negativar yvirskriftir, uttan at kanna, hvat veruliga liggur aftanfyri yvirskriftina?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.